# – Ikki nógvur hummari um summarið



**- Tað er minni av hummara nú, enn tað hevur verið. Tað hevur verið so nógvur toskur inni á firðunum, og hann hevur etið nógv av hummaranum, sigur Elmar Simonsen í Hvannasundi. Hann kundi hugsað sær at hummaratíðin varð broytt til tað, hon var áðrenn seinastu broytingina**

FISKIVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Bárður*

**Hvannasund:** Tað sær sera friðarligt út á havnalagnum í Hvannasundi seinnapartin henda fríggjadagin í apríl mánaði.

Ikki eitt menniskja er at síggja, og við bryggju liggja í hópatali av smærri og størri bátum. Strandfaraskipið Másin liggur mín sann eisini við bryggju.

Ein reyður bussur hjá Bussleiðini í Havn er einasta tekinið um eitt sindur av rørslu og flytingum á havnalagnum. Men í honum er ikki ein sál at síggja.

Tað ber næstan ikki til: Onkustaðni má okkurt slag av vinnuligum virksemi vera á hesi náttúrugóðu havnini.

Vit fáa eyga á nakrar dreingir, sum fjasast við ein skutara, har norðarlaga á havnaøkinum. So var ikki púra manntómt, kortini.

Vit koyra spakuliga yvir tann vegin, og nú síggja vit, at ein reyður lastbilur stendur uttan fyri ein egningarskúr. Men longur frammi sæst ein maður arbeiða í einum øðrum skúri. Hann riggar til egning. Hann sker agn.

- Ánei, tit. Eg eri einki fyri at tosa við blaðmenn. Farið tit heldur yvir í hin skúrin, har tann reyði bilurin stendur.

- Hasin er munandi betri skorin fyri tungubandið enn eg. Hann dugir at siga tað, sigur hesin maðurin, ið er ættaður norðarlaga av oynni.

Vit so gera. Venda bilinum og koyra fram móti reyða lastbilinum. Har er ljós inni í egningarskúrinum, og inn gjøgnum vindeygað síggja vit ein mann í funksjón. Úr skúrinum er annars ikki ein lydur at hoyra.

Tað forðar kortini ikki manninum í egningarskúrinum, Elmari í virksemi sínum, har hann stendur og egnur enn ein stamp.

Hann ger klárt til næsta túr við útróðrarbáti sínum, Neshamar, sum liggur við bryggju norðanfyri byrgingina um Hvannasund.

Har er eisini ein bátahylur, og hagani frá er stutt út á hav.

## Eingin fýraftan

Hvannasundsmaðurin, Elmar Simonsen er einsamallur í skúrinum fríggjadagin hin 29. apríl.

Klokkan er farin at nærkast fýraftan hjá vanligum fólki, men hann stendur líka tolin og líka íðin og festir agnið uppá línuna.

Tá pikkar brádliga uppá hurðina, og inn koma tvey umboð fyri tíðindatænastuna.

- Um vit kunnu fáa eitt lítið prát við hann um lívið sum útróðrarmaður í Hvannasundi?

- Jú, tað er so gamaní. Spyrjið tit bara. So skal eg royna at svara, sigur Elmar vinarliga.

Tað er helst hugaligt hjá honum at fáa eina slíka óvæntaða vitjan, tí sum oftast er hann einsamallur í skúrinum og egnir.

## Rúsur og stampar

Tá satt skal verða sagt, so er egningin bert ein partur av virkseminum hjá Elmari. Ta størru orkuna brúkar hann í fiskiskapinum eftir hummara.

- Eg fiski fyri tað mesta hummara. Hinvegin, so plagi eg onkutíð at seta onkran stampin, tá tað liggur fyri.

- Men akkurát nú er tað mest hummara, eg royni eftir, sigur hann.

Tíðin tá loyvt er at seta hummararúsurnar er júst byrjað - frá 1. apríl - og varir hon fram til 1. oktober. Soleiðis er skipanin nú, men soleiðis hevur tað ikki altíð verið.

Fyrr var hon frá hálvum apríl og fram til hálvan september. Og hesa tíðina dámdi Elmari betur enn hana, teir nú hava.

- Hetta var tann betra tíðin at fiska í, tí tá fekk man nógv meiri av hummara. Eg haldi ikki, at tað er so nógvur hummari um summarið.

- Men tað er fyri salgið skyld, at teir hava broytt tíðina, soleiðis at teir kunnu sleppa av við hann livandi, eins og prísurin er hampiliga góður, sigur Elmar.

## 550 kilo

Henda fríggjadagin, vit vitja egningarskúrin hjá Elmari í Hvannasundi var apríl mánaður nærum liðugur.

Og hvussu - hevur fiskiskapurin eftir hummara higartil í ár verið góður?

- Jú, henda mánaðin havi eg fingið nógvan hummara. Serliga fyrst í mánaðinum, sigur hann.

Hann metti seg hava fiskað eini 550 kilo tann mánaðin, og var væl nøgdur við tað.

- Tað er nøkurlunda, haldi eg. Jú, jú. Tað er rættiliga gott.

Hjá Elmari er ikki trupult at sleppa av við hummaran, sum verður seldur av landinum gjøgnum eitt felag á Argjum, sum kallast ORCA.

## Bara norðanfyri

Bátur hansara, Neshamar liggur sum nevnt norðan